# Tvey oljufeløg samstarva um Schiehallion

*Amerada Hess og BP samstarva nú við tí endamáli sum skjótast at meta um vinnuligu møguleikarnar í Schiehallion-økinum*



*Boripallurin Dyvi Stena, sum júst er byrjaður at bora ein nýggjan brunn í Schiehallion økinum*




*Pílurin við Schiehallinøkið. Nú sigst olja at verða funnin norðan fyri hesa kelduna eisini. Óvíst er um talan er um eitt nýtt øki ella tað er partur av Schiehallion*



Birgir Christiansen
ABERDEEN

**Aberdeen 8. februar**

Tað var væntandi, at júst hesi bæði feløgini fóru at samstarva, tí bæði eru komin fram á tunga ráolju í hvør sínum parti av økinum. Schiehallion økið er á 375 metra dýpi, 240 kilometrar vestan fyri Hetland.

Samstarvið er sum sagt ætlað at skapa eina betri mynd av økinum, ið BP fann í 1993. Partarnir báðir eru longu farnir undir samstarvið, tí fyri nøkrum døgum síðani setti boripallurin »Dyvi Stena«, vegna Amerada Hess, á at bora ein nýggjan brunn, nevndur 204/25-a3.

Ein størri verkætlan verður í summar, har framferðin verður nakað tann sama sum í Foinaven økinum í fjør. Ein 60 daga royndarframleiðsla, har oljan verður pumpað í tangaskip, ið síðani flyta oljuna til lands til kanningar og sølu.

Feløgini eru í løtuni í ferð við at kanna tilboð upp á hetta arbeiðið, og keldur meta eitt samstarv millum triggjar Aberdeen-fyritøkur – Coflexip Stena Offshore, Schlumberger og ABB Vetco Gray – at hava bestu møguleikan.

Viðvíkjandi samstarvinum millum Amerada Hess og BP segði Mike King frá Amerada Hess, at avtalan var ein týðandi lutur í menningini av Schiehallion. Colin MacLean frá BP legði afturat, at samstarvið er enn eitt dømi um at kappingarneytar kunnu samstarva fyri at økja um lønsemi.

Mett verður, at Schiehallion-økið fevnir um blokk 204/25a, ið Amerada Hess hevur ræðið á, og blokkarnar 204/20, 204/25b, 205/16 og 205/21b, ið BP hevur rættindini til. Upprunaliga metingin av oljunøgdini í økinum setti hana til 250-500 milliónir tunnur.

Serfrøðingar frá Wood Mackenzie halda í løtuni, at umleið 375 milliónir tunnur av olju kunnu vinnast úr Schiehallion-økinum og halda teir eisini, at Schiehallion kann mennast á sama hátt sum Foinaven-økið, har flótandi framleiðsluskipanir vera nýttar.

*Oljupallurin Sovereign Explorer:*

# Møguliga funnið nýggja oljukeldu stutt frá markinum



*Tíðindi ganga nú aftur um eitt nýtt oljufund stutt frá føroyska fiskimarkinum. Tað er oljupallurin Sovereign Explorer, sum skal hava rakt við olju norðan fyri eina av hinum keldunum, Schiehallion. Antin er talan um eitt framhald av verandi oljuøki ella um eitt nýtt øki.*

**Nýtt oljuøkið?**

Boripallurin »Sovereign Explorer« er júst liðugur við ein kanningarbrunn beint norðan fyri Schiehallion-økið, og alsamt vaksa gitingarnar um, hvørt boripallurin kom fram á olju.

Eitt felag, ið nevnist Energy Information Services, heldur hetta vera sannlíkt, tí leiðin, har brunnur 204/20-03 varð boraður av »Sovereign Explorer«, er sera væl lýst av trýdimensjónellum seismiskum upplýsingum. Áhugin er størstur fyri, hvørt talan er um eina longing av Schiehallion-økinum ella um hetta er eitt nýtt og serstakt oljuøki.